*Norska oljufelagið SAGA vendir danska parti av Norðsjónum bakið:*

# Vil nú heldur satsa uppá Føroyaleiðina

***-Vit hava stóran áhuga fyri nøkrum sera stórum fundum nærhendis bretskum øki. Hesi eru í niðari tertieru løgunum, og vit hava ein varhuga av, at møguleiki er fyri líknandi fundum á føroyskum øki sigur Hans Christian Rønnevik, kanningarstjóri hjá Saga í Danmark við blaðið Børsen týsdagin.***

JAN MULLER

Norska oljufelagið SAGA er eitt av teimum mongu oljufeløgunum, sum arbeiðir í Norðsjónum men sum nú eisini hevur gjørt av at brúka part av orku síni til leiting á føroyska økinum.

*SAGA er bert eitt av teimum mongu feløgunum, sum vísir føroysku undirgrundini áns.*

Sambært danska blaðnum Børsen heldur fyritøkan møguleikarnar fyri stórum fundum á føroyskum øki verða nógv betri enn t.d. í danska partinum av „Centralgraven" í Norðsjónum.

Hetta er ein av orsøkunum til, at norska felagið ikki síðani 3. útbjóðingarrundu - tá saman við Statoil - hevur søkt um lisens í donsku undirgrundini.

Nú ger Saga haraftur ímóti vart við, at fyritøkan ætlar sær at vera við í 1. lisensumfarinum á føroyskum øki í seinnu helvt av 1997.

-Vit hava serligan áhuga fyri nøkrum sera stórum fundum nærhendis bretskum øki. Hesi fund eru gjørd í niðaru tertieru løgunum, og vit hava varhugan av, at tilsvarandi fund kunnu gerast á føroyskum øki sigur Hans Christian Rønnevig, kanningarstjóri hjá Saga.

Saga stjórin fylgir annars væl við í gongdini á donskum øki, har Statoil, Amerada Hess og Mærsk skulu til at byggja út í 97 og 98.

Men har er bert talan um sokallað marginal fund, og tey hevur Saga ongan áhuga í. Felagið leitar eftir fundum, sum eru nógvar ferðir størri enn tey donsku.

-Vit leita eftir oljukeldum, sum eru uppá 250 til 300 mió. tunnur, og vit halda, at møguleiki er at finna slíkar millum Føroyar og Hetland.







*At Saga vísir føroyska økinum áns, og at føroyingar hava áhuga fyri virkseminum hjá Saga sást á oljuframsýningini í Stavanger herfyri. Her eru tveir mans frá HJ Hydraulik á vitjan á básinum hjá Saga, har m.a. kanningarstjórin Terje Hagevang tók ímóti. Mynd jan*

Søkt verður eftir
**Forritaralærlingi**
til COM-DATA p/f.

Til forritara-deildina á Com-Data í Havn verður søkt eftir forritaralærlingi at byrja skjótast gjørligt. Hevur tú millumskúlaprógv (student, HF, HH e.l.) og áhuga fyri forritning ert tú kanska tann vit leita eftir. Hevur tú áhuga og vilt vita meira, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.
Skrivlig umsókn saman við møguligum ummælum og prógvum skulu vera okkum í hendi seinast 21. okt. 1996.

**Com-Data p/f er ein av landsins størstu og elstu teldufyritøkum. Í dag starvast 30 fólk hjá Com-Data. Vit hava deildir í Klaksvík, Tórshavn og á Glyvrum. Allar deildir veita tænastu innan sølu, forriting og verkstað. Føroya Dataskúli, sum er deild undir Com-Data, heldur til á deildini í Havn.**

COM-DATA P/F
Brekkutún 1
110 Tórshavn
Tlf. 16173
Fax 16116

**Spastikarafelagið**
**Felag fyri spastikarar og børn/vaksin við líknandi breki, t.d. vøddasvinn. Felagið heldur til í MBF-húsinum, Íslandsvegi 10 C. Skrivstovutíð hvønn hósdag kl. 15–17. Tlf. 19027, Fax 10813 (MBF).**

# 40 ÁR

**Týsdagin 22. okt. verður deild okkara í Vestmanna 40 ár.**

*Í hesum sambandi eru øll vælkomin inn á gólvið, har eitt og annað gott verður at fáa, bæði hjá vaksnum og børnum.*

*Verið vælkomin!*

FØROYA SPARIKASSI

# STÓR SPURNARKAPPING Í SMS

- Í komandi viku byrjar ein nýggj SMS spurnarkapping.
- Spurningur og svarseðil verða í **Sosialinum** *hvønn mikudag* og í **Dimmalætting** *hvønn hósdag*.
- SMS-FOTO skipar fyri fyrstu kappingini.
- Nærri fæst at vita í SMS-varpinum nú týskvøldið.